Pedagogar

til Dagstovnin Mýrifípan, Trongisvágur

Stovnslýsing:
Á Mýrufípuni ganga 90 børn í aldrinum 0-7 ár. Stovnurin er skipaður í 5 eindir, ein vøggustova, fýra barnagarðsstovur, harav ein stova er heildagsstova, tvær eru hálvdagsstovur til børn sum ganga ávikavist fyrra ella seinnapart og ein útibarnagarðsstova ið heldur til í øðrum hølum.

Størvini:

- Eitt starv á Reyðu stovu seinnapart 20 tímar um vikuna.
  Reyða stova, sum er ein hálvdagsstova, er normerað til 20 børn í aldrinum 3-7 ár og 3 starvsfólk.
  Arbeiðstíðirnar eru skiftandi millum kl. 12.30-18.00. Starvið verður sett 07. nov. 2005, ella eftir nærri avtalu.

- Eitt avloysarastarv á Bláu stovu, fyri pedagog í barnsburðarfarloyvi 32 tímar um vikuna. Bláa stova sum er heildagsstova er normerað til 20 børn í aldrinum 3-6 ár og 4 starvsfólk.
  Arbeiðstíðirnar eru skiftandi millum kl. 7.30-18.00. Starvið verður sett í tíðarskeiðnum 16. des. 2005-13. aug. 2006, ella eftir nærri avtalu.

Fyri bæði størvini er fundarvirksemi eftir arbeiðstíð tvær ferðir um mánaðin.

Vit vænta av tær :

- at tú hevur góð samstarvsevnir og ert álítandi
- at tú vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum
- at tær dámar væl at verða úti í náttúruni, sum er ein nattúrligur partur av dagligdegnum
- at tú hevur yvirlit í arbeiðnum
- at tú tekur ábyrgd og kannst arbeiða sjálvstøðugt
- at tú ert nærverandi og vísir umsorgan
- at tú vísir áhuga og ynskir at mennast í arbeiðnum

Lønarviðurskiftir:
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Um pedagogur ikki fæst til størvini, verður hjálparfólk sett tíðaravmarkað í staðin.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Biritu Jacobsen á tlf. 372700.

Umsókn:
Saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu verða Dagstovninum Mýrufípuni, FO-826 Trongisvágur í hendi í seinasta lagið fríggjadagin 04.11.2005 kl. 12.00.

Arbeiðshandskar
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi

Beinleiðis frá framleiðara

Landsins størsta úrval
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo

Sosialurin 311820



NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM

Starvið sum "tekniskur hjálpari/húsavørður" í Norðurlandahúsinum

Starvslýsing fyri "tekniskur hjálpari/húsavørður":

Arbeiðsuppgávur
Høvuðsuppgávurnar eru fyrireikingar av stóra salinum í Norðurlandahúsinum, og ljóð- og ljósarbeiði. Umframt hetta eru uppgávur sum vanliga eru knýttar at húsavørðsarbeiði.

Vit ynskja at viðkomandi er:
- ábyrgdarfull/ur, sjálvstøðug/ur, røkin, fyrikomandi og tænastuvinarlig/ur
- kann arbeiða undir trýsti og ikki er bangin fyri nýggjum avbjóðingum.
- klárar seg í føroyskum, enskum og í minsta lagi einum norðurlendskum høvuðsmáli í skrift og tala.

Ynskiligt er, at tann ið settur verður, hevur útbúgving ella arbeiðsroyndir frá líkandi arbeiði. Teldukunnleiki er ein fyrimunir.

Løn og setanartreytir:
Sambært reglum fyri stovnar undir "Nordisk Ministerråd".
Annars eftir sáttmálanum millum "Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið".
Setanartíð og vaktir:
Talan er um fulltíðarstarv.
Setanartíðin er 4 ár, við møguleika fyri longdari starvstíð tó í mesta lagi 8 ár íalt.
Arbeitt verður í vaktarskifti og 4. hvørt vikuskifti. Tann ið verður settur, fær neyðuga upplæring innan alt øki.
Ynskiligt er at viðkomandi kann byrja í seinasta lagi 1. januar 2006

Umsóknir:
Umsóknir við prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:
Norðurlandahúsið
Postboks 1250
110 Tórshavn
og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi, mánadagin 7.november 2005. Merkið bræðvið "Tekniskur hjálpari/húsavørður"

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til stjóran í Norðurlandahúsinum, Niels Halm, telefon 317900, E.postur: niels@nlh.fo

NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM
Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790
www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo

ShapeWorks™
Independent Distributor

Við hjálp frá shapeworks ber til at regulera tey óynsktu kiloini

- einfalt og nemt
- orku og yvirskot
- úrslit

Tú fært alla tað vegleiðing og stuðul tær tørvar.

Um hetta ljóðar áhugavert, so ring fyri at hoyra nærri.



Daniela & Willi Olsen
TEL 42 23 67 · WWW.NYGGJANFIGUR.NU
sjálvstøðugir Herbalife forhandlarar

Sosialurin 341800

GSM telefonir &

GSM & VHF telefonir v.m til skip og bátar

Storno
SØLA & TÆNASTA

Handan Á 6 · Tórshavn
Tel 31 44 14 · Fax 31 80 45
storno@post.olivant.fo

Lesið Sosialin -so eru tit við!

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:

Skrásetingar-nr. P/F 4060
Navn:
P/F Íløgufelagið Royndin
Adressa:
Kopargøta 1 100 Tórshavn
Kommuna:
Tórshavnar
Stovningardato:
18-10-2005
Viðtøkudato:
18-10-2005
Stovnarar:
P/F 2964, P/F Føroya Lívstrygging , Kopargøta 1, 100 Tórshavn
Nevnd:
Poul Hansen, Áarvegur 1, Box 52, 110 Tórshavn, (nevndarformaður)
Súsanna Ewaldsdóttir Sørensen, Norðurstíggjur 11, 160 Argir, (nevndarlimur)
Tummas Theodorsson Eliasen, Undir Nesinum, 650 Toftir, (nevndarlimur)
Stjórn:
Tummas Theodorsson Eliasen, Undir Nesinum, 650 Toftir, (stjóri)
Grannskoðari:
P/F Grannskoðaravirkið Inpact, statsaut. revisorar, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn
Partapeningur:
kr. 20.000.000,00
Inngjaldingarháttur:
Kontant kr. 20.000.000,00 til kurs 100.
Tekningarreglur:
Felagið verður bundið við undirskrift av allari nevndini ella við einum stjóra.
Endamál: Endamál felagsins er sum framtaksfelag at gera íløgur í ymisk vinnuvirksemi.
Roknskaparár:
01.01 - 31.12
Fyrsta roknskaparár:
18.10.2005 - 31.12.2006

Skráseting Føroya
tann 20. oktober 2005

Kristin Balle

Tvingsilssøla

Fríggjadagin 11. november 2005, kl. 13.00, verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin **fyrireikandi tvingsilssølufundur** yvir **bygning á matr.nr. 90d, Svínoy. Tvingsilssølan** verður hildin á Dómaraskrivstovuni **fríggjadagin 9. desember 2005 kl. 13.00.**

Ognin er ein virkisbygningur 544 m² til støddar í einari hædd, gjørdur úr timbri og betong og taktur við icopal. Bygningurin stendur á leigaðum øki og hevur verið nýttur til smoltframleiðslu. Til bygningin hoyra rakstrargøgn.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Christiani Andreasen, advokati, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 311145 (j. nr. 20040777)** ið kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja ognina.

Áhugað kunnu eisini síggja søluuppstilling og onnur skjøl í sambandi við tvingsilssøluna við at venda sær til Føroya Fútarætt.

Føroya Fútarættur
tann 20. oktober 2005

Lesið Sosialin